# Trivnaðarætlan

| Flokkur:<br>4.b | Næmingatal:<br>21 |
|---|---|
| Flokslærari:<br>Brynhild W. Djurhuus | |
| Toymi:<br>Brynhild W. Djurhuus & Kirstin í Hjøllum | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>SP, HU, HL, JÓ, MA, BV, ST, SV |
| Røklaskipanin:<br>Tveir næmingar eru røklar í eina viku ísenn. Uppgávurnar eru at fara eftir og býta út mjólk, býta pappír út millum næmingarnar, og annars hjálpa til við ymiskum. | |
| Borðskipan:<br><br>Borðini verða stilla á ymsan hátt. Viðhvørt sita tey tvey og tvey, viðhvørt fýra og fýra og viðhvørt fleiri enn hetta. Næmingarnir býta pláss fleiri ferðir um árið | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br><br>Mál fyri trivnaðin í flokkinum:<br>At næmingarnir trívast í skúlanum og kenna, at tað er eitt gott og trygt stað at vera er aðalmálið. Teir skulu mennast persónliga og fakliga og dáma og duga at verða í einum felagskapi.<br><br>Arbeiðsháttur:<br>Lærarin má í verki vísa at skúlin er eitt gott stað at verða. Hann má fara virðiliga við næmingunum, og verða ein fyrimynd fyri tað, hann ynskir av næmingunum. Næmingar og lærari hava gjørt nakrar felags reglur um, hvussu vit vilja hava tað í skúlanum og tosað verður javnan um, hvat krevst fyri at náa hesum reglum. Tosað verður við næmingarnar um týdningin av verða góð við hvønn annan og virða hvønn annan o.s.fr. Dømi verða tikin fram.Tá ið trupulleikar eru, verða teir viðgjørdir so hvørt og næmingarnir vera annars eggjaðir til at hjálpa hvørjum øðrum fakliga, og eisini soleiðis, at øll kunnu hava tað gott í skúlanum.<br><br>Ítøkilig tiltøk:<br>-Tey árligu tiltøkini í flokkinum eru eitt nú rennidagurin, jólahald og føstulávintshald.<br>-Okkurt hugnakvøld fyri børnunum verður væntandi 1-2 ferðir í ár. Hetta er foreldraráðið eisini við at fyriskipa.<br>-Tá ið evninsvikurnar verða í summar, eru eisini góð líkindi at gera nøkur serlig tiltøk saman við børnunum. Ivaleyst verður eisini farið á vitjan á Náttúrugripasavninum. -Umframt hetta er seturskúli á skránni í ár. Hetta verður væntandi móti sumri.<br>-Eftir heystfrítíðina verður væntandi farið undir næmingasamrøður, fyri at finna út av, | |

| |
|---|
| hvussu næmingarnir trívast, og hvat kann gerast fyri at gera trivnaðin enn betur. Felagsspøl verða spæld viðhvørt.<br>-At sita í runding og práta um ymiskt í flokkinum og skúlanum, er eisini eitt, sum ætlað er at gera meira við í ár<br>-Foreldrini verða kunna um, hvussu tað gongur við trivnaðinum í flokkinum, m.a. á felagsforeldrafundi og tá viðtalur eru, og í samstarvi við tey, gera vit átøk, ið kunnu bøta um trivnaðin. |
| Serliga viðmerkingar um flokkin:<br>Annað:<br>Flokkurin virkar sum heild væl. Næmingarnir tykjast at dáma væl at verða saman, og eru tey sera hjálpsom og positiv. Tey duga væl at bíða eftir hvørjum øðrum, tá ið tosað verður í flokkinum. Tey megna rættuliga væl at konsentrera seg, og fara hugagóð undir ymsar uppgávur. Arbeiðslagið er sum oftast<br>gott og hugurin og humørið er eisini gott. |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>Sámal Petur Petersen | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
| Lærugrein:<br>Kristni | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Guð og skaparverkið<br>Nóa<br>Teir 3 patriarkarnir<br>Jósef<br>Jesu lív<br>Høgtíðir<br>Syngja sálmar og sangir | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At næmingarnir fáa grundleggjandi kunnleika um Bíbliuna og kristindómin. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Lisið verður upp og uppgávur verða gjørdar. Eisini práta vit um evnini. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Kristnikunnleiki til 4. skúlaár<br>Bíblia<br>Sálmabókin og aðrar sangbøkur<br>Internetið | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Dagliga við práti og uppgávum | | |
| Latin inn:<br>16. september 2009 | Undirskrift lærarans:<br>Sámal Petur Petersen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Brynhild W. Djurhuus | Flokkur:<br>4. b | Skúlaár:<br>2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Føroyskt | | |
| Tímar:<br>Tímar: 6 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Lesing- skriving- málburður | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>-Lesing: at framgongd allatíðina sæst í lesimenningini hjá næminginum,<br>og sum eina felagslinju, at næmingarnir megna at lesa og greiða frá einum, ókendum teksti, ið hóskar til aldurin. Miðað verður ímóti at lesa við steðgi og herðing.<br>-Málburður: At næmingarnir duga at málbera seg væl<br>-At leggja fram: At næmingarnir gerast tryggir við at leggja fram bæði í bólki og sjálvstøðugt.<br>-Mállæra: Næmingarnir skulu læra at stava smáorð og onnur orð, ið verður mett at teir eiga at megna í hesum aldri. Eisini skulu næmingarnir framhaldandi læra um navnorð, sagnorð og nú eisini lýsingarorð. Eisini skulu teir læra at býta navnorð í kyn og seta í eintal og fleirtal. Næmingarnir skulu duga at seta sagnorð í navnhátt, nútíð og tátíð. Eisini skulu næmingarnir læra eitt sindur um bendingar og annars einfalda mállæru.<br>-Skriving: Næmingarnir skulu skriva smásøgur og aðra kreativa skriving, har teir venja at greiða frá og nýta hugflogið.<br>-Skrift:Vit halda fram við fagurskriftini. Málið er, at næmingarnir gerast tryggari við skriftina og ogna sær eina vakra handskrift. Næmingarnir skulu nú so spakuliga gera fagurskriftina til sín persónligu skrift.<br>-Teld: Næmingarnir skulu duga at brúka firstclass skipanina, og byrja at læra grundleggjandi tekstviðgerð.<br>-Sangur og kvæði: sangurin og kvæði eru vanligir tættir í undirvísingini | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Arbeitt verður einsæris og í bólkum<br>-Lesing: Vit lesa nógv. Lesingin í skúlanum fer fram soleiðis: Vit lesa hart, innantanna, tvey og tvey ella í bólki og einsæris fyri læraranum. Vit lesa hvønn dag.Í hesum aldursbólki verður mett, at næmingarnir væl klára at lesa sjálvstøðugt, og tí er hetta ofta arbeiðshátturin. Krøvini í føroyskum eru umfatandi, so ikki er nógv tíð at yvirhoyra einstaka næmingin. Næmingarnir fáa fyri heima hvønn dag.<br>Næmingarnir fáa frílestrarbøkur heim við at lesa, sum teir skulu lesa 15 minuttir í hvønn dag. Loggbók verður førd og kannað við jøvnum millum bili.<br>Fyri at venja lesikynstrið og skrivifærleikan svara næmingarnir ofta skrivligum spurningum í samband við tann lisna tekstin.<br>Málburður: Práta verður í flokkinum við næmingarnir um tekstin, teir hava lisið og sleppa teir eisini til orðanna við at fortelja frá ymiskum, ið liggur teimum á hjarta.<br>-At leggja fram: Næmingarnir skulu viðhvørt siga frá ymsum teir hava upplivað, lisið og avrikað skrivliga.<br>-Mállæra: Næmingarnir skriva fyrisøgn einaferð um vikuna, og annars loysa vit ymsar skrivligar uppgávur og ymsar lættar mállæru uppgávur.<br>-Skriving: Næmingarnir skulu við jøvnum millumbili skriva smásøgur og annað, ið setur krøv til hugflogið og at málbera seg skrivliga<br>-Skrift: Vit skriva fagurskrift í bøkurnar hjá Clemens og annars annað tilfar, ið vit hava á skúlanum.Umleið einaferð um vikuna lata næmingarnir skrivibókina inn til rættingar.<br>Avskriving fer eisini fram í skúlanum. | | |

Tilfar og amboð:

-Lesing: Neyðlending. (skaldsøga) Vit brúka ymsar tekstir úr Ásnið og … Dýr og dorg og Ælabogans litir. Ein onnur skaldsøga verður væntandi lisin seinnu helvt av skúlaárinum. Annars vera frílestrarbøkur nógv nýttar.
-Mállæra: Eg skrivi bøkurnar, firvaldsbøkurnar og tilfar úr ymsum mállærubókum
-Skriving: Kom og skriva
-Skrift: Betri handskrift
-Annars verður egið tilfar og internetið eisini nýtt at koma á mál.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Javnan verða skrivibøkur og loggbók tikin inn til rættingar og eftirmetingar.
Eftir heystfrítíðina og móti vári verða nakrar smáar lesiroyndir gjørdar. Úrslitini verð brúkt at eftirmeta við. Í vár skulu næmingarnir til landsroynd, og verða úrslitini av hesi roynd eisini brúkt at eftirmeta við.
Prátað verður eisini við næmingar og foreldur um, hvussu tey halda at tað gongur

| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>KH | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>09/10 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Støddfrøði

Tímar:
5

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Brot
Kommatøl
Krossskipan
Geometri
Býting

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Brot: at tey læra hugtakið "brot", hvat nevnari ,teljari og brotstrika er.
Kommatøl:at læra um partar av heilum tali og at rokna við kommatøl.
Krossskipan: at tekna eina krossskipan, finna krosstøl og tekna linjir í krossskipanina.
Geometri: at læra um ymisk skap, vinklar, vídd og ummál. Um javnfjarar linjir, at standa vinkulrætt á, og um samskap, samskapsás og spegling.
Býting: at læra at býta í eins stóra partar.

Arbeiðsháttur:
Felags frágreiðing og prát um tey nýggju hugtøkini.Síðani sleppa næmingarnir sjálvi at royna við uppgávum meðan lærarin vegleiðir.
Miðað verður eftir at duga líttlu tabell, sum verður vand regluliga.
Vant verður eisini høvuðsrokning
Í tann mun tíðin loyvir, verður arbeitt við ymiskum temaum úr Skygni 4.

Næmingarnir læra at seta upp í hefti og síðani at rokna.

Tilfar og amboð:
Skygni 4
Avritssíður til Skygni 4
Læraravegleiðing til Skygni 4
Terningar
Teldi/roknimaskina.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Eftirmet verður við støðuroyndum úr Læraravegleiðing Skygni 4 og RM royndir

| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Brynhild W. Djurhuus | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Enskt | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Lesing<br>Mállæra<br>Málburður | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>-Lesing: Málið er, at næmingarnir megna at lesa ein kendan enskan tekst, ið svarar til aldursbólkin og umseta hann.<br>-Mállæra: Her verða ikki tey stóru krøv sett enn. Tó seta vit hol á okkurt evni.<br>-Málburður: Næmingarnir skulu megna at svara stutt aftur á enskum, tá ið teir verða spurdir um eitthvørt. Eisini skulu teir klára at spyrja um okkurt smávegis á enskum. Harafturat skulu næmingarnir eisini kunna tosa eitt sindur við hvønn annan á enskum. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>-Lesing: Næmingarnir lesa upp í flokkinum, tveir og tveir og fyri læraranum einsæris.<br>-Vit lurta eftir enskum tekstum og sangum á ensku ljóðfløguni og syngja eisini nógv á enskum. Næmingar hava fyri heima.<br>Mállæra: Vit gera skrirvligar uppgávur, ið hoyra til tekstirnar vit lesa.<br>-Málburður: Næmingarnir lesa og syngja á enskum og práta smávegis við lærara og hinar næmingarnar. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Mandy on holiday- lesibók og arbeiðsbók<br>Lets do it<br>Frílestrarbøkur<br>Reading Reflex –ljóðlæra<br>Annað sjálvgjørt tilfar og internetið | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmeting fer fram allatíðina millum lærara og næming. Á foreldrafundi verður eftirmett saman við foreldrunum. | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans: | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Brynhild W. Djurhuus | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Søga | | |
| Tímar:<br>1 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Landnám<br>Gamla gudatrúgvin<br>Føroyar verða kristnaðar<br>Føroyar í miðøldini | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Málið er, at næmingarnir koma at kenna tær fyrstu søguligu hendingarnar í Føroyum og kveikja áhuga teirra fyri søgu okkara | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Fyri tað mesta verður lisið upp fyri næmingunum, og kunnu teir síðani gera viðmerkingar og spurningar.<br>Við hvørt verður skipað fyri spurnarkapping ella tílíkum, um evni vit umrøða | | |
| Tilfar og amboð:<br>Søga okkara<br>Internetið<br>Power Point<br>Hóskandi bøkur | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Av og á verður eftirmett við næmingunum | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans: | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Birna Vestergaard | Flokkur:<br>4.a og 4.b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
svimjing

Tímar:
2 tímar. Gentir og drongir skiftast aðru hvørja viku.

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:

Bringusvimjing: Málið er at næmingurin gjøgnum árið fær lært at brúka armar og bein rætt
Ryggsvimjing: Næmingurin skal læra at flóta rætt á rygginum og fáa samljóð millum armar og bein.
Craul: næmingurin skal læra beintakið og at nýta armarnar rætt. Andingin skal so dánt fáast uppá pláss.

Arbeiðsháttur:
Byrja verður við stuttari upphiting, vit brúka breiddina á hylinum til tað.
Bringusvimjing:
Nakað av frálæruni í bringusvimjing verður framd á svimjikantinum. Har skulu tey læra at brúka armar og bein rætt. Hetta fæst fyrst við at læra tey at brúka beintakið við plátu í vatninum. Tá ið tey hava lært tað, verður farið til armarnar, sum er tann lættasti parturin av bringusvimjingi.
Ryggsvimjing:
Næmingurin skal læra at flóta rætt á rygginum. Til hetta verður plátan nýtt. Næmingurin skal síðani læra at nýta armarnar. Tað verður byrja í mylluformi, síðani verður farið til tað meira tekniska, har ið næmingurin skal læra at strekkja segeftir takinum.
Craul:
Næmingurin skal læra at anda rætt, brúka bein og armar rætt. Andingin er sera týdningarmil. Til at læra tað rætt skal næmingin brúka plátuna. Hann skal bara brúka beintøk, og í jøvnum løtum skal næmingurin koyra høvdið niður í vatnið og blæsa út, og koyra høvdið upp og anda og blæsa. Eftir tað skal næmingurin royna seg uttan plátu. Her skal hann koyra høvdið niður í vatnið og blæsa, fyri hvørt triðja tak við armunum skal hann upp at anda.

Tilfar og amboð:
pláta

| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmett verður loypandi og í samskifti við næmingin. | |
|---|---|
| Latin inn:<br>09.09.09 | Undirskrift lærarans:<br>Birna Vestergaard |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Sámal Petur Petersen | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Náttúru og tøkni | | |
| Tímar:<br>3 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Náttúra<br>Luft<br>Vatn<br>Landalæra<br>El, ravmagn<br>Mát<br>Magnetir<br>Sansirnir | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At hugurin hjá næmingum fyri náttúru og tøkni verður kveiktur. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Stutt upplegg og síðan uppgávur, sum verða loystar einsæris ella í bólkum.<br>Fara út at kanna og uppliva náttúruna, sum hon er. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Náttúra og tøkni 1 + arbeiðsbók<br>Lív og gróður<br>Internetið<br>Uppslagsbøkur | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Dagliga við práti og uppgávum | | |
| Latin inn:<br>16.september 2009 | Undirskrift lærarans:<br>Sámal Petur Petersen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>HL | Flokkur:<br>4.a | Skúlaár:<br>09/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Ítróttur | | |
| Tímar:<br>2/viku | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Svimjing og annar ítróttur og spøl. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Viðv. svimjing er at siga, at her eru tveir lærarar, har Birna Vestergaard er svimjilærari og ger ætlan fyri hetta øki.<br>Aðruhvørja viku er annar ítróttur á skemanum, og verður lagdur dendur á, at næmingarnir her fáa eitt gott upplivilsi.<br>At styrkja vøddar og sansir. At menna næmingin bæði grov - og fínmotoriskt,og at læra næmingin mannagongdir og at læra hann at hava fyrilit fyri øðrum | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Hvør tími byrjar við upphiting.<br>Annars er lættari reiðskaps fimleikur, og ymisk spøl,við - og uttan bólt. Tá tað fer at sumra, er ætlanin eisini at hava tiltøk úti á onkrum av teimum smærru vøllunum í kommununi. (Lamba td.)<br>Týdningarmikið at næmingarnir trívast og hava tað stuttligt. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Tey amboð sum eru tøk í fimleikarhøllini. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Ikki nøkur serlig eftirmeting. | | |
| Latin inn:<br>12.09.09 | Undirskrift lærarans:<br>Hans J. Lamhauge | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Noomi Reinert og Brynhild W. Djurhuus | Flokkur:<br>4.a og b | Skúlaár:<br>2009/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Tilevning | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>m.a<br>tekning<br>máling<br>papmaché<br>og annars tað, sum áhugi og tørvur er á | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Málið er at loyva næmingunum at úttrykkja seg á ein kreativan og handaligan hátt. Málið er eisini at læra næmingarnir at handfara ymisk amboð og teknikkir. Harafturat er málið, at arbeiða tvørfakliga við minst einum evni, samstundis sum vit ynskja, at næmingarnir læra at samstarva og hjálpast at. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Vit fara m.a at arbeiða við fuglum. Vit fara at hoyra um fuglar, hyggja at fuglum, tekna fuglar og síðani evna fuglar til úr papmaché. Næmingarnir verða býttir í bólkar, og fáa síðani til uppgávu at koma at kenna onkran fugl væl, og síðani saman evna ein slíkan fugl. Ein framsýnig er møguliga hugsandi<br>Hetta fer at verða rættuliga tíðarkrevjandi, so tíð verður møguliga ikki til so nógv annað enn hetta. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Tekni- og málitilfar<br>Pappmaché tilfar<br>bøkur<br>teldan<br>internetið | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Vit byrja vanliga tímarnir við í smáum at eftirmeta seinastu tímarnir. Tá ið uppgávan er liðug, verður eisini tikið samanum við næmingunum | | |
| Latin inn: | Undirskrift lærarans: | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

<table>
<tr><td>Lærari:<br>Marita og Birna</td><td>Flokkur:<br>4.a og b</td><td>Skúlaár:<br>2009-2010</td></tr>
<tr><td colspan="3">Lærugrein:<br>Hondarbeiði</td></tr>
<tr><td colspan="3">Tímar:<br>Hvør flokkur hevur 2 tímar um vikuna í eitt hálvt ár</td></tr>
<tr><td colspan="3">Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>Blomsturbinding<br>Broderí tráðin, tá ið byrja<br>Binda<br>Jóla/páskaprýði<br>"Primitiva veving" um tíð verður til avlops</td></tr>
<tr><td colspan="3">Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br><br>At læra ymiskar arbeiðshættir, so næmingarnir verða førir fyri at handfara amboð og tilfar.<br><br>At næmingarnir fáa eyguni upp fyri tí skapandi og virða tað.</td></tr>
<tr><td colspan="3">Arbeiðsháttur:<br>blomsturbinding: Læra næmingarnar at brúka tilfar, ið er við hondina. Í hesum føri nýta vit jarntráð, ið vit gera til ein ring. Við skúlan veksur nógvur heiðalyngur, sum vit binda um jarnringin. Binda so eina sloyfu sum prýði og sproyta hárlakk á, so blomsturkransurin kann verða vakur leingi.<br><br>Broderí: Brodera á eitt aida toystykki. Hava nógvar ymiskar litir av tógvi at velja í. Næmingarnir skulu læra ymiskar broderístingir, so sum greinsting, tungusting, krosssting........... Læra at fáa tráðin í nálareyga og at festa tráðin, tá ið byrjað og endað verður (avrikið verður gjørt til eina pútu).<br><br>Binda: Næmingarnir læra at kasta uppá, binda rætt og læsa av. (Verður gjørt til ein lítlan posa ella húgvu).<br><br>Jólaprýði - páskaprýði.<br><br>Veving: Har verða greinar nýttar sum vevrammur . Vevað verður við ymiskum fínum og grovum tógvi og møguliga við ull.</td></tr>
<tr><td colspan="3">Tilfar og amboð:<br>Jarntráð - stáltráð - heiðalyng - ymisk bond - hárlakk<br>Aidatoy - tógv - oddaleysa nál<br>Stokkar - tógv<br>Ikki avgjørt, hvat tilfar verður nýtt til jóla/páskaprýðið<br>Greinar - tógv - grova oddaleysa nál</td></tr>
</table>

| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Mett verður eftir hvørt avrik, hvussu hevur gingist. | |
|---|---|
| Latin inn:<br>07 - 09 - 2009 | Undirskrift lærarans: |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Sólrun Thomsen | Flokkur:<br>4.b | Skúlaár:<br>2009/2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Køk

Tímar:
Flokkurin er býttur í tveir bólkar. Hvør bólkur hevur 2 tímar um vikuna í hálvt ár.

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Matgerð - at skera, flysa, smyrja, píska, kóka, steikja, baka o.s.fr.
Læra at kenna køkin - hvat liggur hvar
Hava góðan ordan í køkinum
Reinføri
Kostlæra

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Tann dagliga undirvísingin í køki fer fram á tann hátt, at næmingarnir skulu læra ymsar arbeiðshættir í køkinum. Teir skulu læra at gera mat, at fara reinliga um í einum køki, og tosað verður somuleiðis um mat sum heild - hvat er sunnur og góður kostur, og hvat er ringur kostur.

Arbeiðsháttur:
Gingið verður eftir fastari skipan av teimum ymsu fjølbroyttu uppskriftunum. Tosað verður um framferðarhátt í samband við matgerðina. Stórur dentur verður eisini lagdur á øll tey praktisku tingini, sum eru at gera í samband við matgerð. Har kunnu m.a. nevnast reinføri, at dekka borð, hava góðan borðsið, at vaska upp, turka av, seta á rætta pláss aftur, feiða gólv, vaska borð, vask, komfýr, skifta nýtt handklæði, viskustykkir og borðlappar út, tøma turkitrumluna og leggja rein handklæði, viskustykkir og borðlappar saman og at leggja upp á pláss, koyra alt skrell vekk og seta nýggjan posa í. Køkurin skal vera í sama standi, tá vit fara út úr køkinum, sum tá vit komu inn í hann!

Tilfar og amboð:
Tilfar til tær ymsu uppskriftirnar verður keypt inn so hvørt.
Ymiskur køksbúnaður verður nýttur, so sum liturmál, bollar, kannur, pískirís, sleivar, vekt, grýtur, pannur, bakarovnur, servisa og bestikk, uppvaskifat, uppvaskibustir, uppvaskibakki, fyriklæði, handklæði, viskustykki, borðlappar,...

Nær verður eftirmett og hvussu:
Javnan verður eftirmeting gjørd saman við næmingunum - undir og eftir undirvísingina.

| Latin inn:<br>15/9-2009. | Undirskrift lærarans:<br>Sólrun Thomsen. |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Johan Danielsen | Flokkur:<br>4. b | Skúlaár:<br>09-10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Smíð | | |
| Tímar:<br>2 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br><br>Uppgávurnar skulu geva møguleika fyri, at nýta amboð so sum leyvsag, hondsag, hamara, fíl, høggijarn og lím. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br><br>Málið er, at hvør einstakur næmingur nemur sær dugnaskap á hvørjum einstøkum økið.<br>Av tí at vit bert hava 2 tímar um vikuna í eitt ½ ár, so er avmarka hvussu stórar lutir vit koma at gera, men miðja verður eftir, at gera 2 til 3 lutir, ið næmingarnir verða glaðir fyri. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>At geva næmingunum nakrar grundførleikar innan træsmíð. Gjøgnum allar arbeiðsgongdir verður dentur lagdur á, at tey gera sær ómak í øllum, tey arbeiða við, so endaliga úrslitið gevur eitt gott avrik, sum tey eru glað fyri.<br>Eisini skulu tey læra, at fara væl um og rudda upp eftir sær sjálvum. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Leyvsag, hondsag, hamara, fíl, høggijarn, lím og træ | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmetingin er grunda á eygleiðing, dagligt samskiftið og næmingasamtalur. Næmingasamtalurnar eru eftir tørvi. | | |
| Latin inn:<br>15. september | Undirskrift lærarans:<br>Johan Danielsen | |